Vestmanna
Ítróttarfelag
3860 Vestmanna

# Lógir fyri Vestmanna Ítróttarfelag

## Grein 1.

Felagið eitur Vestmanna Ítróttarfelag, stuttstavað V.Í.F.. Felagið umboðar allan hondbólt og kappróður í Vestmanna, og er limur í Ítróttarsambandi Føroya.

## Grein 2.

Felagið tekur sær av omanfyrinevndu ítróttargreinum, og góðkennir og fyrireikar allar ítróttarkappingar og - stevnur, sum fara fram í Vestmanna. Samstundis skal felagið skipa fyri venjingum og vekja hugin fyri øktari luttøku. Um felagið heldur tað verða neyðugt, kann tað skipa fyri ymiskum tiltøkum, so sum dansi, bingospæli o.ø.

## Grein 3.

Tann, sum vil gerast limur í V.Í.F., skal tekna seg sum lim hjá einum av nevndarlimunum. Annars verður ein limur uttan aðra fráboðan, um luttikið verður í venjingum felagsins, ella í kapping fyri felagið.

## Grein 4.

Limagjaldið verður goldið fyri eitt ár í senn. Limagjaldið er býtt upp í tríggjar (3) deildir: Hvílandi limir, íðkandi limir í ungdómsdeildum og íðkandi limir í vaksnamannadeildum. Nevndin ásetur sjálv limagjaldið, og nær tað verður goldið. Vil limur siga seg úr felagnum, skal hann fyrst gjalda limagjald fyri tíðina, hann hevur luttikið, og er limurin tá leysur av felagnum aftaná fyrstkomandi aðalfund.

## Grein 5.

Kann, ella vil, limur ikki gjalda limagjaldið til eina av nevndini ásetta tíð, ella á annan hátt arbeiðir felavnum til niðurløgu, kann nevndin taka limaskapin frá viðkomandi.

Vestmanna
Ítróttarfelag
3860 Vestmanna

Grein 6.

Hægsta vald felagsins er aðalfundurin, og er fundurin settur saman soleiðis:

Allir limir hava rætt at møta. Ongin kann á aðalfundi umboða annað enn limaskapin í V.Í.F.. Aðalfundurin skal vera fráboðaður 14 dagar frammanundan við skránni við uppsløgum, lýsingum í bløðum ella lýsingum í útvarpi.

Hildin kann verða eykaaðalfundur, um meiriluti av nevndini ynskir tað. Eykaaðalfundurin skal vera lýstur 8 dagar frammanundan undir somu treytum sum aðalfundurin.

Á aðalfundinum kann lógaruppskot ikki verða viðgjørt, ella lógarbroytingar verða gjørdar, uttan tær standa á fundarskránni. Tó kunnu onnur mál verða tikin til viðgerðar, hóast tey ikki standa á fundarskránni, um 2/3 av teimum, sum møtt eru, játta.

Fyri at uppskot skal verða samtykt á aðalfundi, skal minst helmingurin av teimum møttu atkvøða fyri.

Fundarskráin fyri aðalfundin skal í minsta lagi innihalda fylgjandi:

Formaðurin greiður frá farna ári.

Framløga av grannskoðaðum roknskapi.

Val av nevndarlimum og tiltaksnevndarlimum.

Val av grannskoðara.

Ymiskt.

Vestmanna Ítróttarfelag
3860 Vestmanna

## Grein 7.

V.Í.F. verður stýrt av:

1. Starvsnevnd (vanliga bert skrivað nevndin).

2. Møguligum undirnevndum.

3. Tiltaksnevndarlimum.

til 1: Nevndin verður vald á tí árliga aðalfundinum, men bert helvtin, ella talið næst helvtini, skiftivís omanfyri og niðanfyri helvtina, skal standa fyri valið hvørja ferð, og skulu tað vera teir nevndarlimir, ið hava sitið longst uttan at hava staðið fyri vali. Nevndin skipar seg sjálv. Aðalfundurin avger, hvussu nógvir limir skulu vera í nevndini.

til 2: Aðalfundurin kann samtykkja, at skipast skulu undirnevndir fyri ymisk málsøkir, og hvussu nógvar limir hvør nevnd skal hava. Hesir limir verða valdir á tí árliga aðalfundinum við undantak av formanninum, sum er tann limurin í starvsnevndini, sum hevur málsøkið hjá undirnevndini undir sær.

til 3: Tiltaksnevndarlimir, bæði til starvsnevnd og undirnevndir, verða valdir á tí árliga aðalfundinum. Til starvsnevndina verða valdir minst tveir (2) og til undirnevndir minst ein (1) tiltakslimur.

## Grein 8.

1. Við keyp, sølu ella veðsetan av føstum ognum krevst aðalfundarsamtykt. Aðalfundurin kann tó geva nevndini heimild at taka øll neyðug stig, herundir eisini keyp, sølu og veðsetan av føstum ognum, til at fremja eina ávísa ætlan.

2. Við lántøku við aðrari trygd enn fastari ogn skal øll nevndin undirskriva í felag.

3. Felagið verður annars teknað av formanni og tveimum (2) nevndarlimum í felag. Nevndin kann tó geva einum nevndarlimi fulltrú at tekna felagið einsamallur á ávísum økjum, tó ikki í teimum undir stk. 1 og 2 í hesi grein nevndu førum.

Vestmanna
Ítróttarfelag
3860 Vestmanna

Grein 9.

V.Í.F. er uttanveltað í politiskum og átrúnaðarligum spurningum.

Grein 10.

Heiðurslimur og harvið ævilimur kunnu innlendskir og útlendskir menn og kvinnur gerast, tá ið nevndin heldur, at tey hava verið ítróttini í Vestmanna til so stóran frama, at tey hava so stóran heiður uppibornan.

Grein 11.

Ongin samtykt um avtøku av V.Í.F. kann verða gjørd uttan á aðalfundinum, ið er settur til at taka støðu til henda spurning, og 3/4 av øllum limunum eru umboðaðir, og 3/4 av teimum uppmøttu atkvøða fyri.

Eigur V.Í.F. ogn við avtøkuna, aftanå at allar skuldir eru goldnar, skulu hesar ognir falla ítróttini í Vestmanna til, ella á annan hátt verða nýttar til frama fyri bygdargagnlig endamál.

Soleiðis viðtikið á aðalfundið tann 1. apríl 1984

(Sámal Olsen, fundarskr.)